# Tað var einaferð ein kongur

1.
Tað var einaferð ein kongur,
sum var í ringum lag
Tí hann átti eina dóttur,
sum ongantíð var glað

*Tað koma fyri oyrað*
*Nú skal bara hoyra*

2.
Øll bóru henni gávur,
hon sat í síni dýrd
Og stardi gjøgnum
gluggan og var illa hýrd

3.
Á slottið komu prinsar,
sum ferðast høvdu míl
skemtarar og klovnar, men
ongin fekk eitt smíl

4.
Har komu vakrir sjeikar
og unglingar - men tig
Tann væna kongadóttir
vildi bert hava frið

5.
Tá allir dreingir høvdu
eydnu sína roynt
Var bert ein dólgur eftir,
tey flestu høvdu gloymt

6.
Hann kom úr eini kroysu
so fátæk vóru tey
Kloddafyl og yngstur,
tann seinasti av sjey

7.
Og til vakra slottið kom
so hetta kloss
Alt, sum hann átti,
var til hennara ein koss

8.
Hann fekk ta vøkru
gentu og hennar hjarta við
Tey livdu allar ævir
glað og lukkulig

*Nú var ikki meira*

Orð: Steintór Rasmussen
Lag: Írskt vísulag